# Fyrstur við tí seinasta

## 5 ferðir um vikuna


Sosialurin
Dansurin gekk so lystiliga í Havn síða 4
www.sosialurin.fo
Nr. 96 • týsdagur • 22. mai 2001 • 75. árgangur • Kr. 10,00
Arbeiðsleysur:
Jákup er liðugur í Herfølge
Ítróttur, s. 13–28

# Ja!

**Sjálvandi vil eg halda Sosialin, fyri einans 400,- kr. ársfjóðringin og sparið 380,- í mun til leysasøluprísin.**

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Postnr.: ____________________

Bygd/býur: ____________________

Telefon nr: ____________________

Undirskrift: ____________________

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin
rindar
postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn



## Dagrøktari

Søkt verður eftir dagrøktarmammu til Dagrøktina í Hvalbiar Kommunu at byrja eftir summarfrítíðina.

Tú skalt vera áhugað í at arbeiða við børnum, tú skal gera børnunum ein tryggan og fjølbroyttan gerandisdag. Tú skalt duga at samskifta við foreldrini.

Áhugað kunnu venda sær til Súsonnu Poulsen, dagrøktarleiðara, tlf. 371339.

## Skopunar skúli

Søkt verður eftir 2 lærarum til Skopunar skúla.

- Einum lærara at undirvísa fulla tíð skúlaárið 2002/2003 fyri lærara í barnsburðarfarloyvi.
- Einum lærara fulla tíð til tíðaravmarkað starv.

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til skúlastýrisformannin, tlf. 361174.

Umsóknir við avriti av prógvum skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 20. juli 2002.

**Skúlastýrið fyri Skopunar skúla**
v/ Kristrun Kjærbo
FO-240 Skopun

## Listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík

Sýndir verða akrylmálningar og klipp. Framsýningin er opin frá í dag, 11. juli, til sunnudagin 14. juli. Opið allar dagar frá kl. 14.00–18.00.

Fernisering í dag frá kl. 14.00–18.00. Øll áhugað eru vælkomin.

**Berit Waage Fidjestøl úr Noregi** og **Vígdis Sigmundsdóttir úr Havn**

## Heilsuhjálparafelag Føroya

Skrivstovan er afturlatin vegna summarfrí frá mánadegi 15. juli. Opið er aftur mánadagin tann 5. august.

**Nevndin**

## Frá S&K-felagnum

Vegna summarferiu er skrivstovan stongd frá týsdegnum 30. juli til mánadagin 19. august.

SK **Nevndin**

## Tvingsilssøla

Hósdagin 8. august 2002, kl. 9:00 verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir ognina matr. nr. 27c, Hósvík (AS nr. 2-9/2002).

Talan er um eini sethús uppá umleið 100 kvm. í kjallara- og stovuhædd. Stovuhæddin og partar av kjallaranum er innrættað.

Annars kann sambært meting av ognini upplýsast:
Grundøkið er til víddar 740 kvm. Húsini eru bygd í 1983, eru stoypt og klødd við impregneraðum timbri. Takið er úr galvaniseraðum jarni.

Húsini eru innrættað soleiðis:
**Miðhædd:** Gong við lítlum duri og wc í durinum, baðirúm, 3 kømur, stova og køkur.
Úr gongini í miðhæddini gongur trappa niður í
**kjallaran:** stórt rúm/stova, gong og kjallararúm.

Húsini eru 19 ára gomul, og metast at vera í góðum standi.

Tvingsilssølan er umbiðin av Inga Højgaard, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 109/02), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur,**
*tann 5/7-02*

## Summarfrí

Í tíðarskeiðnum frá 15. juli til 5. august 2002 verður ongin avgreiðsla á Stuðulsstovninum vegna summarfrí.

**Stuðulsstovnurin**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
FO-110 Tórshavn
t-postur: studul@studul.fo

**Internet Sosialurin**
**www.sosialurin.fo**

## Fulltrúi í Vinnumálaráðnum

Eitt starv sum fulltrúi í Vinnumálaráðnum er leyst at søkja

**Høvuðsuppgávur :**
- At ráðgeva landsstýrismanninum og stjóranum
- At gera uppskot til lógir og kunngerðir
- At hava eftirlit við stovnum
- Málsviðgerð
- Kæruviðgerð

**Førleikakrøv:**
Vit hava hugsað okkum, at tú hevur útbúgving frá hægri lærustovni, eitt nú cand. scient. pol., cand. jur., cand. polit. ella verkfrøðingur. Og hevur góðan kunnleika til edv.
Tú skalt eisini duga væl føroyskt og enskt og duga at arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunnu bjóða:**
Starvið er til tíðir strævið, men samstundis sera áhugavert við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti úteftir. Vit bjóða:
- Flex-tíð
- Sjálvstøðugt starv
- Skeið og eftirútbúgvingarmøguleikar

**Løn- og setanartreytir:**
Starvið er lønt eftir sáttmála millm Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag. Viðmerkjast skal, at setanin umfatar Vinnumálaráðið og stovnar undir tí umframt Løgmansskrivstovuna og onnur ráð.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvum, viðmælum o.ø. skal sendast til:

**Vinnumálaráðið**
**Postrúm 377**
**110 Tórshavn**

innan 22. juli 2002. Starvið verður sett skjótast tilber.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Arna Poulsen á tel 356060.

team85

**V I N N U M Á L A R Á Ð I Ð**

**Lesið Sosialin**

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Streymoyar Øki**

## Summarfrí

Vegna summarfrí frá og við 15. juli til og við 4. august 2002 verður avgreiðslan Smyrilsvegur 7 bert opin frá kl. 11.00 til kl. 13.00 nevnda tíðarskeið.

Tollbúðin/avgreiðslan og posttollurin hava opið sum vanligt, eins og telefonin til teirra svarar.

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Streymoyar Øki**

## Summarfrí

Kommunuskrivstovan er stongd vegna summarfrí frá 15. juli til 14. august 2002.

**Skála kommuna**